# eiðsmarknaður í fokus



Fogh hevur yvirtikið vælferðarpolitikkin hjá Javnaðarflokkinum og Lykketoft hevur yvirtikið útlendingapolitikkin hjá fráfarandi VK stjórnini.

Samfelagsfrøðingurin Hans Jørgen Nielsen, ið er lektor á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn heldur, at formenninir eru sum pottur og panna, og í veruleikanum hava meira til felags við hvønn annan enn við sínar stuðulsflokkar. Hann heldur tó ikki, at nakar møguleiki er fyri, at Javnaðarflokkurin og Vinstraflokkurin skipa stjórn saman. Tað hava teir roynt fyrr og tað gekk ikki serliga væl. Hann væntar tó, at tað verða sera breiðar semjur uttan mun til, hvør situr í stjórnini. Eitt nú eru teir stórt sæð samdir um kommunalu nýskipanina, hóast at teir ikki siga tað, sigur Hans Jørgen Nielsen.

## Arbeiðsloysi kann bjarga Lykketoft

Eingin ivi er um, hvørji evni teir báðu stóru flokkarnir vilja hava á skránna - nevnliga, arbeiði, útbúgving og familjulív. Valstríðið er stutt og Fogh er munandi betur fyri í mun til veljarakanningar. Tí verður fyrsta vikan í valstríðnum avgerandi, um Mogens Lykketoft skal gera sær nakra vón um at taka yvir sessin frá Fogh. Eydnast tað honum at seta arbeiðið ovast á breddan, hevur hann ein møguleika. Men alt kann henda - tað er ikki møguligt at stýra einum valstríði, og tað er enn møguligt at bæði Irak kríggið og útlendingamálið fara at fylla heilt nógv, sigur Hans Jørgen Nielsen. Tað skal ikki so nógv til. Onkur hending í Irak, sum eisini hevur val 30. januar kann elva til, at kríggið verður tað stóra evnið.

Higartil eru tað bert Holger K. Nielsen úr Sosialistiska Fólkaflokkinum og Frank Aaem frá Eindarlistanum, sum hava havt Irak kríggið á skránni. Somuleiðis er Pia Kjærsgaard einsamøll um at seta útlendingaspurninginum ovaliga á listan.

## Stuðulsflokkarnir týdning

Um útlendingapolitikkurin fær meira pláss í kjakinum, kunnu Radikali Vinstraflokkurin og Danski Fólkaflokkurin fáa størri týdning. Teir standa langt frá hvørjum øðrum í útlendingamálinum, og í tí sambandi hevur Fogh tann fyrimun, at hansara stuðulsflokkur, Danski Fólkaflokkurin, ynskir eina stranga kós á útlendingamálinum, meðan Radikali Vinstraflokkurin, sum væntandi skipar stjórn saman við Lykketoft, ynskir at føra eina meira opna leið enn Lykketoft lovar, og tað kann tí gerast ein trupulleiki hjá honum, at fáa veljaran at trúgva uppá, at hann kann liva upp til tað lyftið.

Av tí at munurin á Lykketoft og Fogh er so lítil, kann valið hatil í síðsta enda fara at snúgva seg um teirra persón heldur enn teirra politikk. Teir lova stórt sæð tað sama, so spurningurin verður møguliga meira, hvør av teimum, ið fer at inna vallyftini í verki, enn hvat, ið teir lova. Í so máta er Anders Fogh Rasmussen higartil klárt á odda. Sostatt hildu bert 15 % av spurdum dønum í einari lítlari kanning, sum var gjørd týskvøldið, at Mogens Lykketoft er egnaður til at vera forsætisráðharri, meðan 60% hildu at Anders Fogh Rasmussen er egnaður. Fogh stóð seg somuleiðis betur, tá fólk vórðu spurd, hvør kláraði seg best í sjónvarpinum. Hetta er náttúrligt og kemur av, at Fogh hevur tann fyrimunin, at hann er forsætisráðharri. Haraftrat hevur hann verið í fokus seinastu mánaðirnir, meðan fjølmiðlarnir hava bíða eftir valinum, sigur Hans Jørgen Nielsen. Seinasta veljarakanningin gevur Fogh 97 tinglimir, meðan vongurin hjá Lykketoft vinnur 78. Í 2001 var úrslitið 98 til Fogh og 77 til Nyrup.

## Stevnuskráir

Størstu flokkarnir í fólkatinginum eru Vinstraflokkurin og danski Javnaðarflokkurin. Tað er helst annar av teimum, ið fara at skipa stjórn eftir valið. Oman fyri standa teirra stevnuskráir til fólkatingsvalið 2005. Tað er møguligt at finna stevnuskráinar hjá hinum flokkunum, ið stilla upp, á teirra heimasíðum, sum kunnu finnast á www.folketinget.dk undir Partiernes netsteder.

### Venstres 7 valgløfter er:

- Investér 10 milliarder kroner i forskning og udvikling
- Forhøj børnechecken og nedsæt prisen på pasning
- Opfyld de personlige ønsker og behov i ældreplejen
- Reducér ventetiden på opertaioner yderligere
- Fasthold skattestoppet
- Fasthold den ansvarlige udlængingepolitik
- Bedre miljø - mere natur

### Valgprogram - Socialdemokraternes valgløfter

**Fremtidens job**

Vi vil skabe nye arbejdspladser, når gamle lukker og flytter. Vi vil:

- Lette skatten på arbejde
- Målrette indsatsen på de svageste på arbejdsmarkedet
- Styrke samarbejdet mellem universiteter og erhvervslivet

**Styrket uddannelse og forskning**

Vi vil satse på viden og uddannelse hele livet. Vi vil:

- Investere to mia. kroner ekstra i forskning og uddannelse allerede næste år og mere i de følgende år.
- Fordoble antallet af Phd studerende
- Lave en præmieordning for virksomheder, der sikrer praktikpladser

**En bedre folkeskole**

Vi skal igen have verdens bedste folkeskole. Vi vil:

- Ansætte flere lærere i folkeskolen og styrke efteruddannelsen
- Sætte målrettet ind på skoler med mange sociale problemer
- Bruge 600 mio. kroner mere om året blandt andet til renovering af skoler og indkøb af nye bøger og computere.

**En værdig ældrepleje**

Vi skal hava værdigheden og omsorgen tilbage i ældreplejen. Vi vil:

- Sikre bedre tid i ældreplejen til de svageste ældre
- Arbejde for, at de ældre i højere grad for besøg af den samme hjemmehjælper
- Flytte pengene fra administration til omsorg

**Et sundhedsvæsen for alle**

Danmark skal have verdens bedste sundhedsvæsen. Vi vil:

- Bruge 800 mio. kroner over fire år, bl.a. til flere læger og mere sundhedspersonale
- Sikre en hurtigere indsats ved ulykker og akut sygdom
- Gennemføre en omfattende sygehusreform med bedre behandlinger og mere sammenhæng fra diagnose til raskmelding

**Billigere børnepasning**

Det er blevet for dyrt at få passet børn. Vi vil:

- Indføre en maxtakst på 1000 kroner om måneden for børnepasning
- Bruge 500 mio kroner til styrkekvaliteten af børnepasningen
- Gennemføre pasningsgaranti fra seks måneder

**Sikring af miljøet**

Vi vil have fremtidssikret miljøet. Vi vil:

- Stoppe regeringens nedskæringer på natur og miljø
- Styrke indsatsen mod kemikalier
- Forbedre indsatsen for rent vand

**En aktiv integration**

Vi skal styrke integrationen. Vi vil:

- Gennemføre målrettet skoleløft af de dårligste skoler
- Gøre det obligatorisk at lære dansk fra 3-års alderen
- Fastholde 24-års regelen med droppe den urimelige startydelse